## Minningarorð um Alfridu Elisabeth Mittelstein, Skopun

**f. 12.05.1933 – d. 29.01.02.**



Mín góða mamma, takk fyri tað tú okkum lærdi,
at elska Gud, hann ei sín son spardi.

Tú farin er, so sára verður saknað.
Aftur tú er pápa hjá. Sovið søtt, til tit aftur vakna.

Ein fyrimynd tit vóru. Og ynsktu vit gingu tykkar leið.
Vit sigurskrans fáa, tá enda er okkara skeið.

Tit elskaðu tykkar ommu- og abbabørn so fróð.
Vóru um tey so glað og góð.

Tøkk fyri bønir fyri okkum, tað vóru tær ið bóru,
troyst í neyð, tá tit frá okkum fóru.

Hvílið í friði til tykkum bæði, frá mær,
æra veri minni um foreldur, ið eg hevði kær.

**Dóttir tykkara, Vónbjørt**

# Hugnað um politikarar í 25 ár

**Karla Gaard hevur í eina fjórðings øld gjørt politikarum kaffi og ikki minst tikið upp eftir teimum á Gamla Apoteki**



STARVSDAGUR

1. december vóru liðin 25 ár, síðan Karla Gaard byrjaði at gera reint og bera poltikarum, sum ferðast á Gamla Apoteki, kaffi og tað, sum tl hoyrir. Onkur einstakur serlingur, sum t.d. Óli Breckmann, drekkur bara te, veit hon at siga frá. Men tað dugir Karl eisini at gera.

Sagt verður av Gamla Apoteki, at tað er vist bara Óli Breckmann, sum hevur havt dagliga gongd í húsinum longri, enn Karla hevur.

Tað man ikki vera smávegis av søgum, Karla hevur hoyrt hesi árini. Og væl fylgir hon við, so hon veit ivaleyst ein heilan hóp.

Karla er líkasum vorðin »fast inventar« á Gamla Apoteki. Hon er meira sjálvsøgd har, enn fleiri politikarar eru. Hevur »yvirlivað«teir flestu.

Týsmorgunin varð hildin samkoma á Gamla Apoteki í sambandi við 25 ára starvsdag Karlu.

**ej**

# Tað verður <ph_1> í morgin




Av tí, at olju-,ali- og fiskivinnublaðið er við í dag, er ungdómsblaðið <ph_1> útsett til í morgin, hósdagin. Har hava vit millum annað eina samrøðu við Heidi Andreasen og eisini verður nógv umtalaða evnið porno tikið upp. Vónandi halda lesararnir okkum til góðar.

**<ph_1>-redaktiónin**

# ES-limaskapur á dagsskránna

**Føroyar eru um at gerast eftirbátur og mugu gerast meira virknar innan fyri ES. Tað heldur Kaj Leo Johannesen, løgtingsmaður, sum hevur lagt uppskot fyri Løgtingið um føroyskan ES-limaskap**

EVROPASAMVELDIÐ
*Ingi Rasmussen*

Í næstum fer politiska skipanin í Føroyum at taka spurningin um føroyskan ES-limaskap til umrøðu.

Tað er nýggi løgtingsmaðurin hjá Sambandsflokkinum í Suðurstreymoy, Kaj Leo Johannesen, sum birtir kjakið av nýggjum. Hann hevur lagt uppskot til samtyktar fyri løgtingið, sum heitir á landsstýrið um at gera eina frágreiðing, ið lýsir fyrimunir og vansar við føroyskum ES-limaskapi. Hendan frágreiðing skal so til aðalorðaskiftis.

– Spurningurin um ES-limaskap ella ikki hevur oftani verið frammi, men nú eru umleið 30 ár síðan, at vit høvdu orðaskifti á løgtingi um hendan fyri okkum týdningarmikla spurning. Og um vit vilja tað ella ikki, so eru vit noydd at taka eina støðu, tí umleið 95 prosent av okkara útflutningi fer til hendan marknað, sigur Kaj Leo Johannesen.

### Meira aktivar

Talan er ikki um eitt uppskot, sum hevur til endamáls at lima Føroyar inn í ES, men eitt uppskot, sum skal elva til kjak.

– Vit er í verandi støðu ikki við í Evropa, hóast okkara søguligu bindingar tann vegin eru aldargamlar. Tað hevur týdning fyri okkara oyggjar, at vit gerast meira aktivar innan fyri ES-marknaðin. Meðan vit standa uttanfyri og hyggja at, mennist ES, og vit gerast eftirbátar, sigur Kaj Leo Johannesen.

Sjálvur dylur hann ikki fyri, at hann er ES-viðhaldsmaður.

– Víðkanin av ES til at fevna um 25 til 30 limalond er tann mest víðfevnda og samstundis bjartasta friðarætlanin í søgu Evropu. Víðkanin fer at staðfesta frælsi og frið í Mið- og Eysturevropa á sama hátt, sum Vestur- og Suðurevropa hava víst vegin, sigur Kaj Leo Johannesen.

### Mótstøða higartil

Higartil hevur verið greið mótstøða í Føroyum móti at gerast partur av ES. Einans Sambandsflokkurin hevur latið eina hurð staðið á gloppi fyri limaskapi, og so seint sum fríggjadagin løgdu Tjóðveldisflokkurin og Miðflokkurin sjógv millum Føroyar og ES, sum teir siga vera ódemokratiskt.

Skarin av ES-londum verður helst víðkaður í 2007, og skulu nýggj lond gera sær vónir um at sleppa innum, er ikki ov tíðliga at søkja longu nú.



*Kaj Leo Johannesen hevur vakt ES-spurningin aftur*



# Økisgranskingin fær toppkarakter

**Granskingin eigur at halda fram. Tað er greiða niðurstøðan hjá tveimum norskum professarum, sum hava eftirmett granskingardepilin fyri økismenning í Klaksvík. Sostatt hevur granskingardepilin staðið fyrstu próvroyndina við góðum úrsliti**

EFTIRMETING
*Ingi Rasmussen*



*Gestur Hovgaard og hinir granskararnir á økisdeplinum fáa góð skotsmál fyri sína gransking*

Økisgranskingin, sum heldur til í Klaksvík, er ein sólskinsøga.

Tað vísir ein eftirmeting, sum ein norskur professari og ein norskur seniorgranskari júst hava almannakunngjørt.

Granskingardepilin fyri økismenning í Klaksvík varð settur á stovn við árslok 1999 sum ein verkætlan. Upprunaliga var ætlanin at gera ein varandi depil, men so nógvar ivingasamar røddir vóru frammi í granskingarumhvørvinum, at lagt var til brots við eini fyribils ætlan, sum skuldi eftirmetast, tá trý ár vóru fráliðin. Út frá hesum skuldi politiski myndugleikin taka støðu til, um depilin skal halda áfram.

### Long frágreiðing

Eyðun Andreassen, formaður í Granskingarráðnum, hevur vegna Mentamálaráðið vent sær til Jørgen Amdam, professara í økismenning við Háskúlan í Volda í Noregi. Hann hevur saman við einum øðrum norskum granskara í økismenning, Terje Kleven, gjørt støðuna upp og skrivað eina 60 síður langa frágreiðing, sum varð liðug 25. november.

Teir geva granskingardeplinum síni bestu viðmæli, og boðini til føroyskar myndugleikar eru greið: Økisgranskingin í Føroyum eigur at halda fram.

### Góður kvalitetur

Ein av ivunum, sum varð sáddur um granskingardepilin, var um førleikin á deplinum at granska var nóg góður. Hendan iva gera norsku granskararnir til skammar.

Uppá spurningin, um vísindaliga góðskan er nøktandi svara teir klárt játtandi. Vísindaliga bókin, sum granskingardepilin hevur givið út, heldur høgt fakligt støði. Arbeiðsrapportir frá deplinum hava eisini rímiliga høgt støði samanborið við samsvarandi frágreiðingar frá norskum stovnum, siga Amdam og Kleven.

### Fyrst sum nú

Í fyrstu atløgu halda norsku serfrøðingarnir, at granskingardepilin eigur at halda fram við á leið sama leisti sum nú.

Depilin eigur so líðandi at byggja førleikan upp hjá granskarunum, so at teir allir um nøkur ár kunnu hava eina doktaragrad. Skipanin við at hefta ein útlendskan granskara afturat deplinum, sum setir krøv til framleiðslu og góðsku, hevur hepnast væl. Gjøgnum bókaframleiðslu og frágreiðingar hava granskarar á deplinum víst, at teir duga at gera økis- og samfelagsgreiningar.

### Yvir 10 granskarar

Amdam og Kleve halda tað vera ilt at spáa um framtíðina hjá granskingardeplinum, tí hon veldst um politiska viljan. Men teir halda, at Granskingardepilin sum frá líður eigur at mennast til ein varandi stovn við í minsta lagi 10 granskarum. Tað eigur at lata seg gera longu um tíggju ár, halda teir. Um so verður, eigur depilin at vera fast knýttur at einum vísindastovni.

Niðurstøðan er tó, at tað í fyrstu atløgu er skilabest at grunda depilin í Klaksvík sum ein frían granskingarstovn, tí tað gevur deplinum bestu møguleikar at menna granskingina.

## Fakta

– Granskingardepilin til økismenning húsast í gomlu politistøðini í Klaksvík. Harumframt heldur hann eisini partvíst til í Vági.

– Tríggir granskarar arbeiða í Klaksvík og tveir í Vági.

– Endamálið við granskingardeplinum er at útinna og menna samfelagsvísindaliga gransking, serliga við økismenning huga, og at menna vitan og førleika innan økismenning.

– Fyrstu trý árini er granskað í trimum høvuðsevnum. Í 2000: Vinnulívsmenning eftir búskaparkreppuna. Í 2001: Kommunur og bygdasamfeløg. Í 2002: Ungdómur og útjaðarin.

– Depilin hevur latið fleiri útgávur úr hondum. Ein bók "The restructuring of the faroese economy" og fleiri frágreiðingar og smárit eru komin út.

– Fyribils er talan um eina verkætlan, sum tekur trý ár.

# Altjóða virkisføri má bíða

**Danska stjórnin hevur noktað føroyingum og grønlendinum formansskapin í altjóða hvalaveiðifelagsskapinum IWC. Hetta er í andsøgn við tað, sum forsætisráðharrin hevur lovað, heldur Tórbjørn Jacobsen fólkatingsmaður. Danski forsætisráðharrin verjir seg við, at ein arbeiðsbólkur arbeiðir við málinum**

ALTJÓÐA VIRKISFØRI
*Ingi Rasmussen*

Tíðin er ikki búgvin, at Føroyar og Grønland umboða danska ríkið í millumtjóða felagsskapum. Tað er støðan hjá donsku stjórnini, gongur fram av einum svari hjá Anders Fogh Rasmussen forsætisráðharra til Tórbjørn Jacobsen fólkatingsmann fyri Tjóðveldisflokkin.

Tað var tá Fólkatingið varð sett, at forsætisráðharrin segði donsku stjórnina verða sinnaða at viðgera eina skipan, har »det færøske og det grønlandske landsstyre bliver bemyndiget til at handle på rigets vegne i sådanne mellemfolkelige anliggender, der alene angår Færøerne henholdsvis Grønland«, sum hann málbar seg.

Við støði í hesum lyfti hevur Føroya Landsstýri søkt donsku stjórnina um, at Føroyar og Grønland upp á skift hava formansskapin í altjóða hvalaveiðinevndini IWC. Hesum hevur danska stjórnin síðan noktað.

### Lógaruppskot fyrst

Málið undrar Tórbjørn Jacobsen fólkatingsmann, tí hann metir, at tað bara er í Føroyum og Grønlandi, at hvalaveiða hevur áhuga og yvirhøvur er aktuell í danska ríkinum. Hann setti tí forsætisráðharranum spurningar um, hví stjórnin ikki er gingin føroyska ynskinum á møti.

Forsætisráðharrin vísir í sínum svari á, at arbeitt verður við at gera eitt ítøkiligt lógargrundarlag, sum gevur heimastýrunum heimild at handla ríkisins vegna í altjóða spurningum, men arbeiðið er ikki liðugt enn, sigur hann.

Stjórnin ætlar at leggja málið fyri landsstýrini í Føroyum og Grønlandi. Síðan fer hon at leggja eitt lógaruppskot um nýskipan á økinum fram, og Fólkatingið fær soleiðis møguleikan at viðgera og taka støðu til eitt ítøkilig uppskot um at loyva heimastýrinum ein virknari lut í uttanríkispolitikki, sum annars er danskt málsøki.

### Eisini danskt mál

Danski forsætisráðharrin er annars ikki samdur við Tórbjørn Jacobsen um, at tað bert er í Føroyum og Grønlandi, at tað er áhugi fyri hvalaveiði í danska ríkinum.

Í svarinum sigur hann, at eisini í Danmark og í Fólkatinginum er stórur áhugi fyri hvalaveiði. » Dette gælder såvel spørgsmålet om en bæredygtig udnyttelse af havets ressourcer som handelen med truede dyrearter,« sigur Anders Fogh Rasmussen forsætisráharri.

## Rótleys tøgn

Forlagið Agn gevur í hesum døgum út yrkingasavnið Rótleys tøgn av Hákun Spott. Tað er Niels Uni Dam sum hevur skrivað savnið.

Hákun Spott er ein tonktur persónur og savnið er skrivað frá hansara sjónarmiðum.

Hetta er næsta yrkingasavn sum Niels Uni gevur út, tað fyrsta Nudlar kom út í 1994, og tá var tað undir navninum Sívar á Seiðabergi.

Rótleys tøgn kom út í sambandi við bókadagin í Norðurlandahúsinum, har yrkjarin eisini læs brot úr savninum.

Bókamiðsølan stendur fyri útbreiðsluni av savninum, savnið er 40 blaðsíður og kostar 60 kr.